# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Altjóða stríðsdagur

Dagurin er altjóða stríðsdagur hjá kvinnunum, og hevur hann nú verið hildin í Føroyum í nøkur ár. Siðurin gongur heilt aftur til 1910, tá javnaðarkvinnur í Danmark samtyktu at halda kvinnudag. Í 1911 var dagur hildin á fyrsta sinni í fleiri londum eitt nú í Danmark, men enn var áttandi mars tó ikki ásettur stríðsdagur at vera. Hetta hendi eftir, at eitt stórt kvinnuverkfall hevði verið í New York í 1909. Her skipaðu verkakvinnur fyri stórum tiltaki tann 8. mars og kom hesin dagur so líðandi at gerast altjóða kvinnudagur. Leingi var tað tó so, at altjóða kvinnustríðsdagur varð hildin ein sunnudag umkring tann 8. mars, og var hetta fyri ikki at missa løn hendan dagin. Í 1914 hildu danskar kvinnur kvinnudag tann 8.mars og hevur hann síðan í Danmark verið hildin hendan dag. Krøvini vóru frá fyrsta degi betri lívskor fyri verkakvinnur, friður, breyð og valrættur.

Eftir at kvinnur fingu valrætt í flestu fólkaræðiligum londum, gjørdist innihaldið i degnum breiðari og við skiftandi høvuðsevnum. Eisini hevur hugurin hjá kvinnum at halda dagin verið sveiggjað nakað. Undir fascimsuni og nazismuni var ikki loyvt at halda kvinnudag eins og tað undir kalda krígnum mangan var so sum so við áhuganum. Men so lýsti ST 1975 sum altjóða kvinnuár, og eftir hetta gekk av álvara framá við at halda hendan dagin. Eisini innihaldið skifti, og krøvini gjørdust alt meira slík sum javnstøða á øllum økjum, eitt nú útbúgving, sama løn fyri sama arbeiði o.m.a.

Enn tann dag í dag er hesin stríðsdagur sera aktuellur. Enn er langt á mál við eitt nú javnstøðu í politikki. Sum øllum kunnugt eru kvinnur undirumboðarar á løgtingi og í bygdar- og býráðum. Hetta er sera óheppið og gevur eitt veruligt demokratiskt hall, sum eitt framkomið samfelag sum okkara ikki kann liva við. Her má eitthvørt gerast, og hugskotini tróta heldur ikki.

Hví velja kvinnur ikki kvinnur? Hvat kann gerast til tess at tryggja kvinnum javnstøðu í øllum politiskum fora? Ein leið er at skipa fyri kvotum og heilt einfalt lóggeva soleiðis, at ávíst tal av t.d. tingsessum skulu tilskilast kvinnum. Ein onnur leið er at skipa fyri miðvísum upplýsingartiltøkum og her hava einstøku flokkarnir eina stóra ábyrgd. Hvør leið enn verður vald, so kann hesin ójavni ikki halda fram og má eitthvørt munagott tí gerast og her hava myndugleikar, flokkar og skúlaskipanin eina stóra uppgávu.

**Sosialurin**

## Samd við skúlastýrini

**GUNNVÁ VIÐ KELDU**
býráðslimur í Klaksvík, forkvinna í mentanarnevndini



Eg havi allatíðina mótmælt ætlanunum hjá einum meiriluta í Klaksvíkar Býráð at leggja fólkaskúlarnar í Klaksvík saman ella velja leistin við einstreingjaðari leiðslu

Ta stuttu tíð málið um bygnaðarbroytingar hevur verið viðgjørt, havi eg enn ikki hoyrt aðra grundgeving enn, »at so fáa vit minni trupulleikar, vit í dag hava við manglandi samskifti millum skúlarnar.« Fyri tað fyrsta hevur øll árini verið ávíst samstarv millum skúlarnar og fyri tað næsta er henda grundgeving bæði ósaklig og meiningsleys, tá hugsað verður um tær grundleggjandi og umfatandi broytingar býráðssamtyktin kann fáa fyri skúlarnar.

Í vikuni áðrenn býráðsfundin fingu vit niðurstøðuna bæði skúlastýrini og leiðslurnar á báðum skúlunum høvdu undirskrivað. Niðurstøðan var greið, at tey ynsktu at varðveita bygnaðin við tveimum skúlum, tó var ynskiligt við størri samarbeiði millum skúlarnar.

### Býráðssamtyktin

Málið kom fyri á býráðsfundinum 6. februar, har ein meiriluti samtykti at gera beint ímóti ynskjunum hjá báðum skúlastýrunum og leiðslunum í skúlunum. Ynskið hjá hesum meiriluta var, at fara frá at vera 2 skúlar við avikavist 377 og 337 næmingum, til 2 skúlar við eini einstreingjaðari leiðslu, uttan tó at leggja skúlarnar saman.

Í londunum uttanum okkum og her á landi síggja vit vanliga ikki størri skúlaeindir enn um 400-500 næmingar. Havi eisini hoyrt fakfólk í Føroyum og londunum uttanum okkum sagt, "gerið fyri alt í verðini ikki ov stórar eindir".

Vit skulu eisini minnast til broyttu fortreytir okkara her í Klaksvík, har vit væntandi fara at vaksa og býurin fer at broytast annarsleiðis enn fyrr.

Á býráðsfundinum gjørdi eg vart við, at tað er eitt álvarsamt mál, tá eitt býráð velur at ganga ímóti ynskjum hjá báðum skúlastýrunum og leiðslunum á báðum skúlunum, tvs. tilmælum frá fakfólki. Eins og eg saknaði veruligar grundgevingar fyri hvørjar fyrimunir tað verður at fáa EINA leiðslu sum skal hava knapt 1000 børn og einar 60-65 lærarar at stjórna.

### Einki svar fingið

Í samráðingum í býráðnum og við Mentamálráðið havi eg greitt frá míni støðu, sum formaður í Mentanarnevndini, at eg undir ongum umstøðum atkvøði fyri einari ætlan við so illa gjøgnumhugsaðum grundgevingum. Havi eisini spurt bæði Mentamálaráðið og býráðið hvat vit gera meðan arbeitt verður við eini møguligari bygnaðarbroyting, uttan at hava fingið nakað svar.

Støðan sum er íkomin nú har bæði næmingar, lærarar, foreldur og leiðsla føla seg stak ótrygg, kunnu vit sum hava ábyrgdina, ikki bjóða teimum.

Eg vil tí við hesum skrivi gera vart við mína støðu, at eg hvørki havi atkvøtt ella fari at atkvøða fyri hesum máli. At eg havi ávara ímóti teimum trupulleikum sum eru íkomnir, nú ein meiriliuti í býráðnum hevur tikið støðu til at broyta bygnaðin.

Fari eisini at gera vart við, at eg eri og havi allatíðina verið samd í niðurstøðuni skúlastýrini og leiðslurnar eru komnar til.

## Tvær kvinnur og tveir menn á sambandslistan

LØGTINSVAL

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hósdagin 29. mars hevur Norðoya Sambandsfelag aðalfund. Tá fer nevndin at skjóta upp, at skerja uppstillingarlista felagsins til komandi løgtingsval soleiðis, at bæði kynini verða umboðað eins.

Fundurin er samstundis fyrsti uppstillingarfundur hjá felagnum.

- Formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, hevur boðað frá at Sambandsflokkurin skal hava javnstøðu millum kynini í seinasta lagi í 2012, og væntar nevndin í Norðoya Sambandsfelag at náa hesum málinum við at skerja tali á valevnum til løgtingsvalið, sigur felagið í tíðindaskrivi.

Til seinasta løgtingsval hevði felagið sjey valevni, men til komandi løgtingsval fer felagið, sambart uppskotinum frá nevndini, at stilla upp fýra valevni – tvær kvinnur og tveir menn.

Til seinasta løgtingsval fekk Sambandsflokkurin 602 atkvøður í Norðoya valdømi. Tað eru 115 atkvøður ov lítið til at vinna seinna mandatið frá Fólkaflokkinum.

Norðoya Sambandsfelag er umboðað í landsstýrinum við Bjørn Kalsø, so hetta kann venda gongdini – og kanska kunnu tær báðar kvinnurnar gera tann vørrin sum skal til til tess at vinna flokkinum umboð aftur á løgtingi.

Býtið at atvkøðurnum millum sambandsvalevnini var annars hetta:

Bjørn Kalsø 192
John Kári Jacobsen 116
Magni Laksáfoss 80
Jákup Meinhardt Hansen 55
Karl Olgar Joensen 37
Erikka Elttør 32
John William Joensen 18

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.